Røða á kravgonguni 1. apríl 1995:

Nei til lønarniðurskurð!

Vit góðtaka ikki slík eksperiment hjá politikarunum. Onga staðni í heiminum hevur beinleiðis nominellur lønarniðurskurður verið brúktur sum amboð í tí yvirordnaða búskaparpolitikkinum. Ikki eingang í teimum sokallaðu »bananrepublikkunum«.

Lønarniðurskurðurin í 1993 var eitt sokallað »buksupissaraeksperiment«. Uppkallað eftir hendingini, tá ið tann fávitskuti maðurin stóð úti í kuldanum og frysti. Hann umhugsaði støðuna, og kom til ta niðurstøðu, at best var at pissa í buksurnar, tí so bleiv hann heitur. Tað fløvaði væl. Men stokkut var gleðin, tí so skjótt sum landið kólnaði og frysti, varð støðan nógv verri, enn hon hevði verið áðrenn.

Tað var eitt tílíkt eksperiment, sum okkara desperatu politikarar gjørdu í 1993. Teir høvdu, aftaná ta fyrstu bankakreppuna, fingið kravbo frá Poul Schlüter um at lækka tær almennu útreiðslurnar. Kravið var at fíggjarlógin skuldi javnviga.

Nógvum hava vit funnið okkum í frá politikarum millum ár og dag. Tað kann tí tykjast ófatuligt, at vit tordu at gera avtalur við teir. At álitið á teir kortini var so stórt, at vit góðtóku slíkt, sum tá varð borðreitt við. Tað hevur eisini seinni víst seg at verða ein sonn vanlukka fyri okkara samfelag.

Teir hóttu við umfatandi uppsagnum, um ikki lønirnar vórðu lækkaðar alt fyri eitt. Sjálvandi vildu fakfeløgini ikki hoyra talan um lønarlækking, men fyri at fáa fíggjarlógina at javnviga hetta árið, vildu vit lána teimum 8,5% av lønini í 11 mánaðir.

Minnist til, at grundin til at hallið á fíggjarlógini var umleið hálva milliard hesi árini, var at spekulantar og politikar høvdu spælt sær í landskassanum ígjøgnum øll 80-ini. Politikararnir høvdu givið veðhald til høgru og vinstru, og nú skuldi gildið gjaldast. Øll veðhaldini blivu effektiv samstundis og tað var hetta, sum tyngdi fíggjarlógina. Tað vóru ikki lønirnar.

Adressan um sparing var skeiv. Tað vóru ikki lønmóttakararnir, sum høvdu oyslað. Fyri at umganga at politikararnir skuldu sorla enn meira av samfelagnum sundur í desperatiónini, gingu almennu fakfeløgini við til fyribils at fara 8,5% niður í løn í eitt avmarkað tíðarskeið.

Talan var um eitt »buksupissaraeksperiment«, tí hitin frá einum slíkum tiltaki er stokkutur og úrslitið er ein enn verri støða. At lækka keypiorkuna hjá fólki so brádliga, hevur ávirkan á alt samfelagið. Ikki bara familjurnar, sum fáa inntøku frá tí almenna sektorinum, men so sannliga eisini tær, sum fáa frá tí privata.

Tað, sum síðani er hent kenna vit øll. Vit hava fingið eitt arbeiðsloysi, sum ongantíð fyrr og fólk í túsundatali eru flutt av landinum.

Tað tók heldur ikki nógvar mánaðir, fyrr enn Fíggjareftirlitið mettið, at tey nýggju húsini í Havn ikki vóru meira enn 500 tús. kr. verd og á bygd var virðið mett til 300 tús. kr.

Inntøkan hjá einum so stórum parti av fólkinum var minkað so nógv yvir so stutta tíð, at roknistykkið hjá tí privata húsarhaldinum ikki hekk saman longur. hetta er bæði galdandi fyri tann privata og tann almenna sektorin.

Hetta førdi við sær, at alt bankakervið stóð til at falla og yvir 3 mia. kr. máttu sprænast inn í bankarnar.



Tey vóru fleiri hundrað í Tinganesi leygrdagin og gjørdu vart við seg

Tær árligu rentuútreiðslurnar av lánunum, sum landskassin hevði tikið fyri at bjarga bankunum, er netto einar 10 ferðir størri enn sparingin, ið var framd við at lækka almennu lønirnar við 8,5% í februar 1993.

Tað hevur ongantíð verið eitt skilagott búskaparpolitiskt amboð at lækka lønirnar, og tað góðtaka vit ikki. Vit góðtaka ikki slík eksperiment longur. Vit vilja hava tað aftur, sum vit lántu landsstýrinum. Tað er okkara sjálvsagdi rættur.

Nú mugu buksurnar vaskast reinar aftur.

Poul Geert Hansen

Myndir: Kalmar

→

spurnartekin við allar avtalurnar millum Føroyar og Danmark síðani 6. oktober 1992, tá fara fakfeløgini ikki framhaldandi at ganga undir tann lønarniðurskurð, sum hesar avtalur byggja á og hava elvt til.

Fakfeløgini rætta her landsstýrinum eina hjálpandi hond og siga: Latið okkum standa saman um at smoyggja hesar avtalur av okkum, latið okkum rætta ryggin, hyggja Bjørn Westh og hansara slag beint í eyguni og siga: sleppið tykkum av landinum og havið avtalurnar við tykkum, sum hava lagt Føroyar og føroyingar í leinkjur.

Hetta landsstýrið, sum læt seg velja uppá at vilja rudda upp, kann byrja at arbeiða við at beina lønarniðurskurðin av vegnum.

Er eingin vilji til tað, er heldur eingin vilji til at sleppa føroyingum burtur úr teimum snerrum, ið danir hava lagt fyri okkum.

Annars kann verða sagt um okkum, bæði landsstýrið og fakfeløgini: Vit lótu okkum lumpa og tá vit uppdagaðu tað, lótu vit okkum lumpa eina ferð afturat.

Landsstýrið kunnu vit ikki svara fyri, men tað skal ikki verða sagt um fakfeløgini. Tí er boðskapurin greiður og einfaldur: Vit undirskriva ikki nakran sáttmála við landsstýrið uttan at tað er avtala og greitt stendur skrivað, hvussu lønarniðurskurðurin verður tikin av aftur og nær.

Jákup Danielsen

Eisini virkin í Norðuroyggjum

Á útjaðarøkjunum, serliga í Norðuroyggjum og í Suðuroynni, eru tað tey, sum ilskast, tí tey kenna seg meinari rakt av verkfallinum enn tey á miðøkinum. Tey fáa til dømis ongan post og sleppa ongan veg, tí strandfaraskipini liggja.

Men eisini á hesum støðum eru fólk í verkfalli, og nú fara verkfalsfólkini í Norðuroyggjum eisini at gera verkfalsarbeiði.

Leygardagin kallaðu Eyðgunn Samuelsen, formaður í felagnum hjá lærarum á Teknisku skúlunum, og Jóna Olsen, næstformaður í Pedagogfelagnum, verkfalsfólkini inn til ein kunnandi fund.

Tær høvdu ikki væntað ta stóru undirtøkuna, men útivið 80 fólk møttu. Tað ver ikki so galið, tí tilsamans eru umleið 120 í verkfalli í Norðuroyggjum, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Verkfalsfólkini í Norðuroyggjum eru m. a. sjúkrasystrar, lærarar á tekniska skúla og HF-skeiðinum, sjúkrasystrar, limir í Starvsmannafelagnum, maskinmeistarar, pedagogar og sjúkrasystrar.

Á fundinum vórðu settir niður tríggir arbeiðsbólkar. Ein bólkur samskipar, ein blaðbólkur og so ein bólkur, ið skal leggja tiltøk til rættis.

Ætlanin var at fara til verka longu í gjár. Tá var ikki greitt, hvar arbeiðshølini skulu vera, tí tey eru ikki líka væl stødd sum í Havn við felagshúsum.

randi